


SERLIG KUNNGERÐ

Øll, sum eiga at verða sett í skatt, skulu geva upp skattskylduga inntøku sína – annars verður inntøkan mett og sekt áløgd!

**TAKS-ráðið**




sansir.fo

**Kundin í miðdepilin, er týðandi mál í Tryggingarfelagnum Føroyum. Ein liður í at røkka hesum máli er, at øll skaðaviðgerð er miðsavnað á eini deild í Tórshavn, fyri á henda hátt at tryggja eina fakliga góða og einsháttaða viðgerð av skaðum. Til hesa deild verður søkt eftir leiðara.**

Arbeiðsøkið er fjølbroytt og spennandi. Tað fevnir í høvuðsheitum um at hava dagligu leiðsluna av skaðaviðgerðini og teimum starvsfólkum, sum har starvast, og styrkja kundatænastuna innan skaða, soleiðis at kundin í øllum viðurskiftum fær eina góða tænastu.

### Uppgávurnar fevna m.a. um

> at leiða og fordeila arbeiðið viðvíkjandi øllum privatum og vinnuligum skaðum
> at hava dagligu starvsfólkaábyrgdina av áleið 12 starvsfólkum og skiftandi næmingum
> at taka avgerðir í serliga truplum málum
> at støðugt dagføra arbeiðshættir og mannagongdir innan skaðaviðgerð

### Vit vænta

> at tú hevur hug og evnir at ganga á odda, og ganga nýggjar leiðir
> at tú hevur lætt við at samstarva, og dugir at fáa starvsfólk at virka væl saman sum eina eind
> at tú ert tænastusinnað/ur
> at tú megnar at taka avgerðir og fremja hesar í verki
> at tú ert fyrikomandi og fryntlig/ur

### Fyrimun hevur umsøkjari sum

> hevur leiðsluroyndir
> hevur løgfrøðisliga útbúgving ella royndir
> er væl fyri tryggingarfakliga.

### Lønar-og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggjarstovnar í Føroyum. Lønin verður ásett í mun til royndir og førleika.

Er hetta nakað fyri teg, ella hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Helga L. Petersen, deildarstjóra á tlf. 34 56 00 ella við at senda teldupost til hlp@trygging.fo.

Umsóknarfreistin er 30. januar 2009 kl. 12.00.

Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:
Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella umvegis www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*